VINNUMÁLARÁÐIÐ

Fuglafjarðar kommuna
530 Fuglafjørður

Tórshavn, tann 5. juli 2007
J.Nr.: 200600350 /
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: NW

Tygara skriv:

13 JUL. 2007
FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

**Viðv. umsókn um at gera tunnil Kambsdal-Millum fjarða**

Víst verður til umsókn, dagfest 17. januar 2007, um at fáa loyvi til tunnilsgerð Millum fjarða-Kambsdal.

Sagt skal vera frá, at landið sær ein størri fyrimun í, at landið sjálvt stendur fyri tunnilsgerðini Kambsdal/Gøtudal – Millum fjarða, og í løtuni tí ikki ætlar, at tunnilin skal vera gjaldstunnil. Sum høvuðsreglu verður hildið, at landið eigur at bera útreiðslurnar til íløgur í infrakervið, og lata verkløgini vera ókeypis at nýta, tí á henda hátt fær landið mest nyttu burturúr framdu íløgunum. Í ávísum førum hevur landið tó góðtikið, at bummpengafígging verður nýtt í s.v. undirsjóartunlar, tá tað annars hevði verið ósannlíkt, at týðandi íløgur vórðu framdar.

Í hesum føri er tó sannlíkt, at tað almenna verður ført fyri at fremja áðurnevndu íløgu, og er hon eisini raðfest í *Samferðsluætlan 2008-2020*, sum nýliga er útkomin. Harumframt er víst á, at tunnilin er neyðugur í sambandi við ætlanirnar at gera fast samband millum Skálafjørðin og Tórshavn.

Eg skilji, at kommunan er ótolin eftir, at okkurt skal henda í hesum málinum. Vónandi og væntandi ganga ikki nógv ár, áðrenn arbeiðið uppá verkætlanina kann byrja.

Vinaliga,

Bjarni Djurholm
landsstýrismaður

/ Niels Winther
deildarstjóri

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 60 60 • TELEFAX 35 60 65 • E-MAIL: VMR@VMR.FO